## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í vestan. Sólglottar, men kanska okkurt ælið og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin sum frálíður upp í ein strúk av suðri og landsynningi og fyrrapartin turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Hita upp saman við Stanley

**Sum eitt slag av upphiting til Summar Festivalin, fer Stanley Samuelsen saman við vinum at spæla í Miðlahúsinum hóskvøldið**

TÓNLEIKUR
*Petur Háberg*

Ikki øll hava møguleikan at fara til Klaksvíkar í vikuskiftinum, og tí fáa tey, sum fegin vilja hoyra Stanley og vinmenn, møguleikan hóskvøldið kl. 20.

Stanley kemur beint av einum sera væleydnaðum túri í Svøríki, har hann hevur spælt tvær konsertir.

Nú gongur leiðin heim til Føroya, har hann skal spæla á Summar Festivalinum.

Talan verður ikki um nakra hábærsliga og formella framførslu, men meira um eina jam-løtu, har fólk kunnu støkka inn á gólvið til ein kaffimunn og njóta tónleikin.

Stanley fer at framføra tónleik av báðum undanfarnu fløgunum, men eisini kemur okkurt lánilag inn í millum. At hjálpa sær hevur hann Knud Henriksen á bass og Torkil Johannesen á trummum.



*Sum eina róliga upphiting til Summar Festivalin fer Stanley Samuelsen at spæla í Miðlahúsinum hóskvøldið*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 33 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 34 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 14 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. skamt í útnyrðing úr Føroyum fer spakuliga eystureftir og gevur nógvan vind av útnyrðingi hósnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer norðureftir. Djúpa lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga eystureftir, men brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjakvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/7 kl. 06[00] – 30/7. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/7 kl. 06[00]– 30/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 73,0 mm

**Atgongumerki til Miðlahúsið á ólavsøku**

*Vinnararnir eru drignir.*

Ferð við Atlantsflog til Íslands
**nr. 58**

Ferð við Atlantsflog til Íslands
**nr. 150**

Gisting á Hotel Tórshavn eina nátt og døgurði fyri tvey
**nr. 222**

Skemtbøkurnar hjá Óla P
**nr. 17**

Sigið frá á telefon 341800, navn, adressa og telefon.

**Sosialurin/ Miðlahúsið**

### VESTFALLSKYRRINDI

4. august Mánin næstur jørðini
5. august Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. aug | 09.14 | 21.34 | 08.14 | 20.34 | 08.29 | 20.49 | 11.14 | 23.34 | - | 12.14 | 07.29 | 19.49 | 06.29 | 18.49 | 09.29 | 21.49 | 10.29 | 22.49 | 08.59 | 21.19 | 10.14 | 22.34 |
| 2. aug | 09.55 | 22.15 | 08.55 | 21.15 | 09.10 | 21.30 | 11.55 | - | 00.34 | 12.55 | 08.10 | 20.30 | 07.10 | 19.30 | 10.10 | 22.30 | 11.10 | 23.30 | 09.40 | 22.00 | 10.55 | 23.15 |
| 3. aug | 10.35 | 22.56 | 09.35 | 21.56 | 09.50 | 22.11 | 00.15 | 12.35 | 01.15 | 13.35 | 08.50 | 21.11 | 07.50 | 20.11 | 10.50 | 23.11 | 11.50 | - | 10.20 | 22.41 | 11.35 | 23.56 |
| 4. aug | 11.18 | 23.43 | 10.18 | 22.43 | 10.33 | 22.58 | 00.56 | 13.18 | 01.56 | 14.18 | 09.33 | 21.58 | 08.33 | 20.58 | 11.33 | 23.58 | 00.11 | 12.33 | 11.03 | 23.28 | - | 12.18 |
| 5. aug | - | 12.34 | 11.34 | - | 11.49 | - | 01.43 | 14.34 | 02.43 | 15.34 | 10.49 | 23.46 | 09.49 | 22.46 | - | 12.49 | 00.58 | 13.49 | - | 12.19 | 00.43 | 13.34 |